# ítróttur

Nr. 46 • fríggjadagur • 7. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

StÍF-VÍF 34-27 (15-14):

## Stórspæl frá StÍF

**Í løtum var snøgt sagt klassamunur á, tá StÍF staðfestu oddasessin við stórsigri á verjandi meistarunum úr Vestmanna**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Serliga í fyrra hálvleiki var talan um ferðmiklan og undirhaldandi dyst, men eftir steðgin tók heimaliðið fullkomuliga yvir, soleiðis at VÍF fekk ein avsmurning av tí heilt sjáldsama slagnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Lagt var veruliga upp til stórdyst, tá StÍF og VÍF hittust á Skála mikukvøldið. Fyrst og fremst tí talan her var um liðini, sum hava staðið seg best hetta kappingarárið, men eisini tí so nógv annað spældi inn.

Tey árini, har VÍF í seinastuni hevur verið mest sum einaráðandi í føroyskum manshondbólti, hevur StÍF verið mest sum einasta liðið, sum hevur kunna hótt teir, og tier hava eisini argað. Fyrst og fremst í steypakappingini, har teir trý ár á rað hava bast VÍF, men eisini í landskappingini hava teir argað.

### Ferð á

Tí hildu vestmenningar ivaleyst, at tað nú skuldi verða teirra túrur at seta strandingar upp á pláss, men tað var tó skjótt, at hetta tos fall til jarðar.

Strandingar byrjaðu nevnliga dystin við buldur og brak. Eftir eina heldur laka byrjan upp á endaspælið, funnu teir nakað av rætta spælinum fram seinasta sunnudag, og fyrstu løtuna av dystinum mikukvøldið hildu teir á fram við hesum. Við konstentreraðum verjuspælið varð grundarsteinurin undir einum góðum avriki settur. Sum vant, stóð Marian eisini sum ein múrur innan fyri verjuna, og spakuliga byrjaðu strandingarnir at toga seg burtur frá mótstøðuni.

Tað tóktist eisini hesa løtuna, sum um VÍF bert hevði eittans vápn í royndunum at basa StÍF. Seinastu dystirnar hevur tað hepnast væl hjá vestmenningunum, tá teir hava roynt at sett nógva ferð á spælið ígjøgnum allan dystin á tamb, og tað tóktist eisini, sum um hetta var ætlanin hesaferð. Alla tíðina varð roynt at trýsta mótstøðumenninar, soleiðis at hesir ongan tíð fingu tíð at hvíla seg, men tað var ein trupulleiki við hesum.

Eins og onnur lið hava ásannað, so er júst ferðin ikki besta vápnið móti tekniskt sterku strandingunum. Aloftast fær hetta bara tað allar besta fram í liðnum, og tó at teir fyri tað mesta máttu finna seg í, at Costin Dumitrescu varð skermaður út av 5-1 verjuni hjá VÍF, so megnaðu teir fyri tað mesta at halda skjóta spælinum gangandi.

Men hóast truplu støðuna, so megnaði VÍF at reisa seg fyri steðgin. Fyrst og fremst tí teir fingu verjuna at koyra sum eina væl pakkaða eind. Skjótingarnar gingu skjótt, soleiðis at neyðuga uppbakkingin alla tíðina var til staðar, og tað gjørdist alsamt truplari hjá strandingum at skora. Hinvegin sýndi Áki Olsen aftur, at hann nú er um at koma fyri seg. Fleiri megnaði hann einsamallur at bróta seg ígjøgnum til skot, og sleppur hann tað, so ger tað sama, hvør málverji er fyri. Og tá Daniel Rápa so eisini byrjaði at finna hol í verjuni beint undan steðginum, fekk VÍF togað seg heilt upp á javnt undan steðginum.

### Steðgurin kom illa við

Tað er oftani sæð, at steðgurin í hálvleikinum hevur fullkomuliga ymiska ávirkan á tvey lið, og soleiðis var eisini hesaferð. Fyri vestmenningar, sum tá veruliga høvdu arbeitt seg inn í dystin, mundi hetta kennast sum ein avbrótan av rútmuni, meðan tað hjá strandingum hinvegin mundi vera talan um eina kærkomna hvíliløtu.

Og eftir steðgin gjørdi heimaliðið bart. Verjan hevði nú fingið taki á Áka Olsen. Kvika álopisspælið varð aftur funnið fram, og so líðani bumbaðu teir seg ígjøgnum eitt alt meira frustrerað VIF-lið. Fyrstu løtuna av steðginum vunnu teir 7-1, og tá VÍF eftir hetta fór niður við nakkanum, so var tað ikki nakar stórvegis trupulleiki at koyra sigurin heim.

Og seinasta korterið ella so var veruligur klassamunur á liðnum. Ein munur, sum eisini greitt lýsti sinniligu støðuna hjá leikarunum. Vestmenningar hingu lútandi við høvdinum í ásannanini av, at dysturin var taptur. Strandingar hinvegin lýstu av spæligleði. Eina ferð fyri og aðra ferð eftir fóru teir við kvikum og frekum kombinatiónum ígjøgnum VÍF verjuna, sum til tíðir ikki visti síni livandi ráð. Somikið stórur var munurin í spælinum, at løgdu strandingar í, kundi sigurin væl verið størri, men sum so nýtist tað ikki at hava nakran týdning.

### Avgerandi í Vestmanna

Tað tykist nevnliga eftir dystin greitt, at avgerðin um FM bíðar til seinasta umfar. Í øllum førum sum støðan er í løtuni. Her hava strandingar tvey stig fleiri enn VÍF, men hinvegin hevur VÍF ein munandi betri málmun, sum í seinasta enda kann vísa seg at verða gull verdur.

Og tó at VÍF fór niður við nakkanum mikudagin, so vilja teir ivaleyst gera alt til tess at halda stutta tjóðrinum, sum teir í løtuni hava á StÍF. Ráð eru í øllum førum ikki at tapa, og spæla teir upp til sítt besta, so er ilt at síggja, hvør skal steðga teimum í hesum.

Og somuleiðis er ilt at síggja, hvussu StÍF skal steðgast. Sum spælið koyrir í løtuni, er í øllum førum eingin, sum stendur teimum kurl, men hinvegin hava teir onkun tíð havt lyndi at tapa teir løgnastu dystirnar. Tað eru so eisini ráð til eina einstaka ferð í teimum seks eftirverandi dystunum, so leingi sum tað tapið ikki er í Vestmanna á seinasta leikdegi.

### Dysturin í tølum

StÍF-VÍF 34-24 (15-14)
Málskjúttar:
StÍF: Sveinur Justinussen 8(1), Costin Dumit5rescu 7(4), Alexandur Johansen 7(1), Artur Johansen 6, Kristjan Petursson 2, Jón Rasmussen 2, Bent Djurhuus 1, Borgar Danielsen 1
VÍF: Áki Olsen 11(1), Daniel Rápa 4, Áki G. Olsen 4(2), John Zachariasen 3, Ingi Olsen 2, Ólavur Brimnes 2, Agnar Joensen 1
Brotskøst: StÍF 6, VÍF 4
Útvísingar: StÍF 3, VÍF 1
Dómarar úr Neistanum: Sámal Hansen & Kristian Johansen. Høvdu onkrar trupulleikar fyrstu løtuna, men lótu ikki við seg koma, og tá teir fyrst vóru heitir, koyrdu teir dystin ígjøgnum uttan stórvegis hóvasták.



## Einki er avgjørt

**- Vit rokna so ikki við, at VÍF fer at missa meira, og tí fellur avgerðin um FM ikki fyrr enn á seinasta leikdegi, heldur Artur Johansen**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Tað var sjálvandi ein fegin Artur Johansen, sum eftir dystin mikukvøldið kundi staðfesta, at í løtuni er StÍF sterkasta hondbóltsliðið í landinum, og gott og væl tað.

Síðani vetrarsteðgin hevur annars gingið sera striltið hjá strandingunum, men móti Neistanum sunnudagin bragdaði av álvara, og mikudagin varð hildið fram á sama hátt.

### Eingin frágreiðing

Spurdur, hvussu tað ber til, at strandingarnir júst nú tykjast hava funnið stórspælið framaftur, sigur Artur, at tað hevur hann ikki nakað greitt svar fyri.

- Eg veit ikki, hvat tað er, sum hevur gjørt hetta, men tað tykist tíbetur, sum um vit nú eru um at koma fyri okkum aftur. Tá endaspælið byrjaði, tóktust vit onkursvegna vera troyttir og tungir, hóast hetta ikki er vanligt, tá ein steðgur hevur verið í kappingini. Tá er tað ofta hinvegin, men tað var tað so ikki hjá okkum.

Um sjálvan dystin móti VÍF, helt Artur, at tryggi sigurin fyrst og fremst komst av, at allir á liðnum gjørdu júst soleiðis, sum avrátt var frammanundan.

- Undan dystinum tosaðu vit um, at vit máttu hava tol, breidd og disciplin í spælinum. Tað var einasta fasta avtalan vit høvdu, og hana hildu allir leikararnir til fulnar. Serliga tað, at vit alla tíðina høvdu neyðuga tolið í spælinum gjørdi, at VÍF ikki fekk nøkur býtt kontramál. Vit avsluttaðu ikki upp á 90% kjansir, men bíðaðu til veruligi møguleikin var har, og so hildu vit eisini alla tíðina høvdið kalt.

- Kanska vóru onkrir avbrennarar seinastu løtuna, men tað var eftir at vit mest sum vóru vísir í sigrinum. Tá kemur sjálvsálitið mest sum av sær sjálvum, og alt fellir so nógv léttari.

- Og so má eg eisini nevna Marian. Hann var í øllum førunum ein av stóru mununum á degnum. Einki skal takast frá Eli, sum er ein góður málverji, men í dag høvdu vit betra málverjan, og tað var avgjørt við til at tryggja okkum sigurin, sigur Artur.

*Artur Johansen var sjálvnadi væl nøgdur um dystin, men hann heldur fast um, at enn er FM-stríðið púrasta opið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



### Enda við braki

Tá tosið kemur inn á gullið, og hvussu langt burturi ella hvussu nær hetta nú er, heldur Artur tó ikki, at dysturin mikudagin broytti nakað.

- Nei. Tann avgerðin fellur ikki fyrr enn 12. apríl í Vestmenna. VÍF hevur ein nógv betri málmun enn vit, og eg dugi illa at síggja, hvussu teir skulu missa nøkur stig fram til tá. Eg rokni í øllum førum ikki við, at teir fara at undirmeta nakað sum helst mótstøðulið, tí teir vita við sær sjálvum, at teir ikki hava ráð at missa nakað, so tað verður eitt satt brak seinasta umfarið, sigur Artur Johansen at enda.

## Taptu upp á 10 minuttir

**Áki Olsen iðraði seg eftir dystin um, at vestmenningar í so stóran mun sleptu takinum í løtuni eftir steðgin**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*



*- Vit hava bæði Kyndil og KÍF eftir á útivølli, og tað eru so avgjørt ikki léttir dystir, men hinvegin hava strandingar eisini dystir eftir móti liðum, sum teir hava tapt fyri, heldur Ákio Olsen um tey seks seinastu umførini av landskappingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Tað var byrjanin av seinna hálvleiki, sum oyðilegði alt fyri okkum. Vit mistu fullkomuliga takið og fóru niður við høvdinum, og so var einki at gera.

Áki Olsen var bersøgin, tá vit eftir greiða tapið hjá VÍF fyri strandingum, fingu orð á hann.

### Sluppu ov væl

Vónbrotið um hetta var eisini væl skilligt. Eftir at VÍF seinastu løtuna av fyrra hálvleiki hevði strítt seg inn aftur í dystin, var alt tveitt fyri borð, tá strandingar innan áttu minuttir skutu sjey mál á rað. At finna ítøkiligu orsøkina til hetta, kann kanska vera trupult, men yvir høvur helt Áki, at hann og liðfelagarnir ikki vóru nóg klárir hesa løtuna.

- Teir sleppa snøgt sagt alt ov lætt. Vit geva teimum alt ov góðar sømdir at skjóta, og so verður man revsaður. Eg veit ikki hví, men vit hava fleiri ferðir í ár sæð, at júst løtan eftir steðgin er sera trupul hjá okkum, og tað er avgjørt nakað, sum vit mugu betra.

### Einki avgjørt

Um sjálvt FM-stríðið heldur Áki annars, at enn er so einki avgjørt hesum viðvíkjandi, tó at treytirnar hjá VÍF nú eru harðnaðar nakað.

- Vit kunnu framvegis avgera alt sjálvir. Vinna vit rest, so verða vit meistarar, men tað verður sjálvandi trupult. Vit hava bæði Kyndil og KÍF eftir á útivølli, og tað eru so avgjørt ikki léttir dystir, men hinvegin hava strandingar eisini dystir eftir móti liðum, sum teir hava tapt fyri.

- Men tað krevur so undir øllum umstøðum, at vit eisini vinna seinasta dystin í Vestmanna, og tað kann gerast trupult. Vit hava tað ikki serliga gott við hasum strandingunum, sigur Áki Olsen at enda.

## Sannførandi meistarar

Eingin ivi var um, hvat var besta liðið í unglingadeildini í talvi í ár. Vestmanna talvfelag endaði hálvt áttanda stig framman fyri næsta liðið í deildini, sum var úr Gøtu. Ikki minst var tað stórspæl av John Martin Andreasen, sum staðfesti oddastøðuna hjá vestmenningum. John Martin telvaði níggju talv í kappingini, og vann tey øll! Og tað var eingin annar telvari, sum honum hetta kynstrið eftir.

Endaliga støðan í unglingadeildini gjørdist hendan:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | VT | 28,0 |
| 2 | GTa | 20,5 |
| 3 | KTFa | 19,5 |
| 4 | GTb | 18,0 |
| 5 | HT | 16,5 |
| 6 | KTFb | 16,5 |



*Vestmenningar vóru mest sum einaráðandi í unglingadeildini í talvi. Á myndini eru tað Rógvi Hansen, Jóhannus Johannesen, John Martin Andreasen, John Johannesen, Eyðálvur í Dávastovu, Rúni Vørmadal og Reidar Egilsnes*

## Nýggjur landsliðsvenjari settur

**Flogbóltssambandið hevur sett danska Jesper Brix at venja manslandsliðið, sum í summar skal royna seg á Oyggjaleikunum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Flogbóltssambandið hevur nú sett venjara at taka sær av fyrireikingunum hjá manslandsliðnum, nú Oyggjaleikarnir av álvara eru farnir at nærkast.

Talan er um Jesper Brix, sum eisini áður hevur tikið sær av landsliðnum. Hetta var í 1999, tá menninir vunnu bronsu á Gotlandi.

Jesper hevur annars í fleiri ár verið ein av berandi kreftunum í Frederiksberg Volley, har hann millum annað hevur vant fleiri av føroysku landsliðsleikarunum hjá kvinnunum, sum hava verið partur av elituliðnum hjá felagnum.

Yvir høvur er talan eisini um ein roynd harra innan flogbóltin. Seinast í 80'unum var hann partur av Holte-liðnum, sum var mest sum einaráðandi í donskum flogbólti, og eftir at hann í 1990 flutti til Skt. Jørgen var hann eisini fleiri ferðir partur av danska endaspælinum, har talan eisini gjørdist um heiðursmerki, tó at hesi ikki vóru úr gulli. Við á linum hjá Skt. Jørgen tá var annars eisini Klæmint Isaksen.

Sum partur av fyrireikingunum til nýggja starvið var Jesper eisini í Føroyum, nú steypafinalunar vórðu leiktar, og sum skils, so var hann eisini væl nøgdur um tað, sum hann har sá.

Umframt Jesper hevur Flogbóltssambandið eisini sett hjálparvenjara. Tað er 39 ára gamli Suni Hansen, sum í nógv ár hevur verið ein av føstu leikarunum á manslandsliðnum, umframt at hann bæði hevur verið føroyameistari við ÍF og steypavinnari við SÍ.

At enda upplýsir FBF, at tað framvegis ikki er gjørt av, hvør verður venjari hjá kvinnulandsliðnum. Samband hevur verið við fleiri venjarar, og væntandi verður hesin spurningurin avkláraður í nærmastu framtíð.